## Lizzie átti største hittið í Danmark

Føroyska Lizzie átti største hittið á Tjeklistanum hjá DR í 2008. Í heilar 24 vikur var sangurin Ramt I Natten á listanum, og tað var longri enn nakar annar Dagin eftir at føroyskur tónleikur varð heiðraður til heimliga Planet tiltakið, hevur Tjeklisten, sum verður mettur sum ein tann týdningarmesti hitlistin í Danmark, gjørt upp, hvussu tað gekk í farna ári. Største hittið á Tjeklistanum í 2008 var Ramt I Natten hjá føroysku songkvinnuni Lizzie. Hetta var fyrsta veruliga útspælið hjá Lizzie sum sangari, og tað gekk sum smurt hjá henni. Lizzie var í heilar 24 vikur inn á Tjeklistanum við Ramt I Natten, og fleiri vikur var hon ovast við sanginum. Ramt I Natten er fimtstørsta hittið í søguni hjá Tjeklistanum.

## Smyril Line avtekur óljuavgjaldið

Frá 1. januar 2009 strikar Smyril Line óljuavgjaldið, sum hevur verið lagt á ferðaseðlar við Norrønu. Avgjaldið er 100 krónur. Tað var sum eina avleiðing av methøgu óljuprísunum fyrr í ár, at Smyril Line 1. mars í ár legði eitt serligt óljuavgjald upp á 100 krónur fyri hvørt ferðafólkið, sum keypti sær ferðaseðil við Norrønu. Nú óljuprísurin er fallin munandi heldur felagið, at tað er nattúrligt at serliga óljuavgjaldið verður strikað, soleiðis at kundin sleppur undan at gjalda hendan eykakostnað. Umframt at avtaka óljuavgjaldið avtekur Smyril Line frá 1. januar 2009 eisini bókingargjaldið sum hevur verið 60 krónur fyri hvønn persón, boðar Smyril Line frá í morgun.

# Kringvarpið í Vágsbotni



*Bjarnheðin í Hoyvík, tekniskur framleiðari, er væl nøgdur við ókeypis pallin Tórshavnar kommuna hevur latið teimum í Tórsgøtu*



*Tað eru nógv fólk til arbeiðis fyri at fyrireika kvøldið. Á andlitunum er líkt til, at Kringvarpið trívist nærindis Vágsbotni*




*Jens Marni Hansen - ið her hevur ljóðroynd saman við Kim Hansen - má metast sum ein av favorittunum til heiðurin sum tann besti innan tónleikin*

**Stjørnukast, sum vanliga nýggjárssendingin hjá Kringvarpinum kallast, verður í Tórsgøtu í ár. – Størsta avbjóðingin er tað tekniska. Tí hølini eru illa egnaði til sjónvarp, sigur Bjarnheðin í Hoyvík, framleiðari**

NÝGGJÁRSHALD
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Elin í Stórustovu og Kaj Joensen vera vertirnir á gólvinum, samstundis, sum Súni Merkistein og Fróði Laksagarð vera við kjakborðið, tá Kringvarpið fer at senda beinleiðis nýggjárssending úr Tórsgøtu. Elitan úr føroyskum tónleiki og ítrótti er boðin við. Tann besti av øllum skal finnast út á kvøldið í bæði tónleiki og ítrótti, har Jens Marni Hansen og Pál Joensen mugu vera mettir at vera avgjørdir favorittar. Jens Marni vann tvær Planet Awards og Pál Joensen er ungdóms evropameistari og hevur svomið skjótastu juniortíð í heiminum, men áðrenn hetta verður avgjørt verður ymiskt annað á skránni.

Tað vera nevniliga undirhald, gestir, live tónleikur og innsløg úr árinum, ið fór innan ítrótt og tónleik. Tónleikurin, ið verður framførdur í Tórsgøtu er veittur av tíggju ymiskum bólkum ella tónleikarum.

### Góð Tórsgøta

- Vit kundu ikki ynskt okkum ein betur kolissu. Hon er her, og okkum nýtist ikki at gera nakað fyri at betra hana. Ein annar fyrimunur er, at vit kunnu nýta streym frá tjóðpallinum og hava bæði backstage og afterparty í Hotel Tórshavn. Tað tekniska hevði verið einasti fyrimunurin við at verið í útvarpshøllini heldur enn her, men so høvdu vit verið noydd at smíða eina kolissu sjálvi, sigur Bjarnheðin í Hoyvík avgjørdur.

Í túninum er stórt tjald sett upp, og hetta skal vera ein náttúrligur útbygningur av reinsarífðnum.

- Tað er eitt rímiliga lítið høli, og tí hava vit avgjørt at byggja út við tjaldinum, har fólk skipa fyri eini barr eisini, greiðir Bjarnheðin í Hoyvík frá.

### Verri myndir

Framleiðarin er tó eitt sindur skeptiskur, tá tað kemur til at framleiða myndirnar.

- Her er so lágt til loftið, at vit ikki kunnu nýta kranar ella nakað. Tað er eisini ein stór avbjóðing, at gera ljósið nøktandi, og mann kann tí ikki rokna við perfektum myndum, metir Bjarnheðin í Hoyvík.

### Seta upp uttanfyri

Av tí, at tiltakið ikki er alment, verður ikki møguleiki hjá fleiri enn teimum innbodnu at leita sær á reinstaríið, men framleiðarin kundi hugsað sær at bjóða fleir fólkum í Tórsgøtu, meðan sendingin verður frá 20-23 nýggjársaftan.

- Um veðrið verður til vildar, so seta vit ein bil uttanfyri, soleiðis at vit fáa seint beinleiðis ljós og ljóð á ein stórskýggja uttanfyri. Soleiðis fáa fleiri møguleika at luttaka, greiðir Bjarnheðin í Hoyvík frá.

### Arbeitt í tveir mánaðir

Hóast nógvar uppsagnir hava verið í Kringvarpinum, og tað í mongum førum kennir seg skert, so verður stjørnukast gjørt uttan serligar avmarkingar.

- Vit avgjørdu fyri tveimum mánaðum síðani at skipa fyri hesum tiltakinum. Sjálvandi kostar tað eitt sindur av peningi at gera eina so stóra framleiðslu, men tað er ikki dýrari enn so nógv annað, metir Bjarnheðin í Hoyvík.

Í annaðkvøld, tá sendingin verður sett í gongd, verða eini 20 fólk til arbeiðis, fyrireikingarnar hava gingið fyri seg í tveir mánaðir, men tað mesta av arbeiðinum var gjørt í døgunum fyri jól.